# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Teir somalisku sjórænararnir eru sum dýr, og eg vóni ikki, at nakar annar kemur í teirra hendur*

*leyslatin sjómaður*



*Tað var sum sild í tunnu í floghavnini í Bangkok í morgun*
*Mynd: AP*

# Túsundtals ferðafólk føst í Bangkok

**Umleið 8.000 mótmælisfólk hava hersett altjóða floghavnina í Bangkok, og tey sýta fyri at fara haðani**

Teilendsku myndugleikarnir noyddust at steingja altjóða floghavnina í høvuðsstanum í gjár, tá fleiri túsund mótmælisfólk otaðu seg inn í floghavnina og steðgaðu øllum virksemi har. Síðani hava fleiri túsund ferðafólk sitið í floghavnini og bíða eftir at sleppa avstað, men í morgun gjørdu myndugleikarnir av at flyta ferðafólkini burtur.

Vesturlendsk tíðindafólk søgdu frá bussum, sum fluttu troytt ferðafólk úr floghavnini. Hildið verður, at meiri enn 3.000 ferðafólk vóru í floghavnini, tá mótmælisfólkini otaðu seg inn hagar, og bara í gjár vórðu umleið 80 fráferðir avlýstar. Millum flogførini, sum ikki sluppu avstað, var eitt hjá SAS við ferðafólki, sum skuldu heimaftur.

Fólksins Demokratiska Rørsla, sum stendur fyri mótmælunum í Teilandi, sigur, at limir hennara verða verandi í floghavnini, til Somchai Wongsawat, forsætisráðharri, leggur frá sær.

# Bretar skelkaðir av incest-máli

**19 ferðir vóru tvær ungar kvinnur í Bretlandi við barn við sama manni - pápa teirra**

Rætturin í enska býnum Sheffield hevur dømt ein 56 ára gamlan mann lívlangt fongsul fyri kynsligan ágang ímóti døtrum sínum. Lívlangt fongsul merkir ikki altíð, at viðkomandi skal sita alt lívið í fongsli, men í hesum føri gjørdi rætturin av, at tann dømdi skal ikki sleppa út fyrr enn í fyrsta lagi um 19 ár og seks mánaðir.

Í Sheffield Crown Court viðgekk maðurin at hava neyðtikið tær báðar døturnar 24 ferðir og fýra aðrar tilburðir, har talan var um annan kynsligan ágang enn neyðtøku.

Í rættinum kom fram, at tær báðar genturnar vórðu við barn 19 ferðir, eftir at pápin hevði neyðtikið tær. Tær fingu níggju børn. Tvey teirra doyðu. Í hinum tíggju førunum mistu tær børnini, og í einstøkum førum valdu tær fosturtøku, sigur BBC.

Kanningarnar hjá ákæruvaldinum avdúkaðu, at ágangurin ímóti gentunum byrjaði, tá tær vóru átta ára gamlar. Settu tær seg upp ímóti honum, hótti hann við at buka tær. Í hesum sambandi varð víst á, at pápin er stórur og prúður maður.

- Øll í húsinum ræddust hann. So skjótt tey hoyrdu bil hansara uttanfyri, lupu mamman og børnini í hvør sítt rúm í húsinum, segði ákærin í rættinum.

### Hótti døturnar

Í fleiri førum hótti tann 56 ára gamli døturnar við at halda einum gassbrennara fyri andlitið á teimum, og í rættinum kom fram, at onnur gentan hevði brent seg við vilja nakrar ferðir fyri at sleppa undan ágANGinum frá pápanum.

Fá vistu, hvat fór fram aftan fyri teir fýra veggirnar í húsum teirra. Skuldu foreldrini út til eitt ella annað, læstu tey børnini inn í hvør sínum kamari. Tey vildu ikki hava barnagentu sum onnur, segði ákærin.

Tað kom fram undir rættarmálinum, at pápin hótti við at beina fyri døtrunum og børnum teirra, um tær royndu at sleppa til rýmingar. Hann mælti teimum frá at varskógva løgregluna, tí hon fór ikki at trúgva teimum kortini.

Tær báðar genturnar byrjaðu at taka p-bollar, men pápin gav teimum boð um at tveita teir burtur, og tær so gjørdu.

# Torført at sleppa av við D'Angleterre

Í eitt ár hava íslendingar átt tað kenda hotellið í Keypmannahavn. Nú royna teir at selja tað

Íslendska fealgið Nordic Partners roynir í hesum dørum at selja hotallið D'Angleterre í Keypmannahavn. Danskir íleggjarar hava ikki víst seg at hava áhuga, og teir útlendsku íleggjararnir úr Týsklandi, Niðurlondum og Eysturríki, sum hava gjørt vart við seg, hava boðið minni, enn eigarin kann góðtaka.

D´Angleterre er eitt tað best kenda hotellið í øllum Norðurlondum og liggur stak væl fyri við Kongens Nytorv mitt í Keypmannahavn. Nordic Partners keypti hotellið í september í fjør. Tað kom ongantíð fram, hvat íslendingar høvdu goldið fyri D'Angleterre og tvey onnur hotell, sum teir keyptu um sama mundið, men mett verður, at prísurin var um eina milliard krónur. Í dag er virðið væl minni, og ein møgulig søla fer ivaleyst at kosta íslendinbgum nakrar hundrað milliónir krónur, skrivar Morgunblaðið.

## STUTT SAGT

### Drápið var politiskt

Verjin hjá fýra monnum, sum eru tiknir og settir í samband við morðið á russisku blaðkvinnuna Onnu Politkovskaja fyri tveimum árum síðani, vil vera við, at tað var ein russiskur politikari, sum legði drápið til rættis.

Murad Musayev, sakførari, segði við tíðindafólk í Moskva í gjár, at politikarin er nevndur í ákæruritinum hjá ákæruvaldinum, og hann segði seg hava fingið vissu fyri, at maðurin er framvegis í Russlandi.

Anna Politkovskaja var kend fyri sínar atfinningarsomu blaðgreinar um eitt nú kríggið í Kekenia, har hon legði russiska herin undir at fara óneyðuga harðliga fram. Hon bleiv funnin skotin uttan fyri íbúð sína í Moskva á heysti í 2006.

### Uppsagnir hjá Finnair

Finska flogfelagið Finnair kunngjørdi í gjár, at tað fer at siga 71 starvsfólkum á farmadeildini úr starvi næsta ár. Hesar uppsagnirnar koma afturat 300 øðrum, sum felagið hevur boðað frá fyrr.

Leiðslan í Finnair sigur, at hon hevur endurskoðað fíggjarætlanina, sum bleiv løgd í summar, og at niðurstøðan er, at felagið má spara í minsta lagi fýra milliónir evrur á farmadeildini. Í einari fráboðan til virðisbrævamarknaðin í Helsinki sigur felagið, at farmaflutningurin fer at minka 10 prosent næsta ár, og at felagið noyðist at laga seg eftir tí.

### Clement úr SPD

Wolfgang Clement, sum var ráðharri í stjórnini hjá fyrrverandi týska kanslaranum Gerhards Schröder, er farin burtur úr sosialdemokratiska flokkinum SPD. Orsøkin er sambært Clement sjálvum, at hann er misnøgdur við leiðsluna í flokkinum.

Í brævi til formannin í SPD, Franz Müntefering, fýlist Wolfgang Clement á, at leiðslan í sosialdemokratiska flokkinum hevur ikki dugað at víst, hvør munur er á SPD og vinstraflokkinum Die Linke.

Müntefering og Frank-Walter Steinmeier, uttanríkisráðharri, hava ta støðu, at SPD kann ikki skipa stjórn saman við Die Linke.